


Her er vrakið av Havørn komið til Havnar. Hinir vraklutirnir eru umborð á Tjaldrinum, sum bjargaði teimum.

Brotnaði undir sleipingini

Tað var sleipingin, sum breyt víkingaskipið Havørn og ikki kollsiglingin.

Hetta siga tríggir av manningini, sum vóru við Havørn, sum kollsigldi út fyri Norðradali í juli í fjør, í einari grein í norska tíðarritinum Seilas og Båtliv.

Í greinini greiða teir frá ferðini, sum byrjaði í Noregi 14. juni. Havørn var í Hetlandi, áðrenn skipið kom til Føroya.

Teir skriva, at teir blivu skelkaðir, tá teir sóu Havørn aftur — í fimm pørtum. Tí skipið var heilt, tá tað sakk.

Vit lata teir greiða frá:

»Etter en natts søvn (á Sjómansheiminum í Havn) var vi spente på om båten var slept inn til Torshavn. Allerede ved frokostbordet ble vi oppsøkt av to journalister og fotografer. Om vi ville være med for å posere foran vraket? Vraket?!!

Vi hastet ned til havna hvor et sørgelig syn møtte oss: Havørn lå i fem hoveddeler; undervannsskroget i én, hver av sidene i to deler. Hvordan var dette skjedd? Dette spørsmålet stilte vi oss, men hadde ikke annet svar enn at båten måtte være slept i stykker.

I mellomtiden var noe ganske annet blitt meldt over færøysk radio. Der hevdet de at båten knakk sammen under kullseilingen, fordi den var for svakt bygd. Noe lignende ble meldt i Norge. Dette ble næring for mang en diskusjon og vi fikk ganske hard kritikk. Det virket som om alle færøyinger var båtbyggere eller hadde en kamerat som var. Det avgjørende spørsmålet om hvordan båten kunne påføres slike skader av bare å ha blitt krenget ned, kunne imidlertid ingen svare på. Vi hadde derimot sett at båten var hel og uten skader da den forsvant.

Det som var funnet av vrakgods fikk vi overlevert før vi skulle reise. Samtidig fikk vi anledning til å snakke med fiskeren som først oppdaget Havørn og begynte å slepe båten. Han kunne bekrefte det vi hadde ant; at båten var hel og uten synlig skade da den kom opp igjen, men at påkjenningene den ble påført, da de forsøkte å slepe den på tvers med rigg og seil oppe, ble for store. Etter et par timers slep var den blitt slitt i deler. Det føltes godt endelig å få vite hva som virkelig var skjedd selv om det var en sørgelig slutt på en fantastisk tur.«

Føroya rættur:

Fyrra sølan er tann rætta

Tríggir sakførarar komu úr Danmark til rættarfund fríggjadagin. Fleiri føroyskir starvsfelagar teirra vóru innkallaðir at vitna og aðrir komu fyri at lurta, tá tvey sera áhugaverd sakarmál blivu viðgjørd í Føroya rætti.

Sama ognin bleiv seld tvær ferðir í sama mánað. Forkeypsrættur bleiv ikki uppdagaður, fyrr enn Tinglýsingin fekk bæði skeytini.



Fredag den 17. januar 1986

9.15: borg.sag 1017/1985: Johannes Sofus Olsen, Th.
m o d
Torfinn Lambaa og P/F B.W.Møbla- + sølan, Th.

9.15: 2660/1984: P/F Møblasølan c/o. B.W.
m o d
Birgir Andreasen, Th.

Eitt løgið mál.

Eisini sorinskrivarin gjørdi hesa niðurstøðuna, tá hann fríggjadagin hevði hoyrt um eitt — ella rættari tvey — húsakeyp í Havn í september 1984.

Sorinskrivarin vildi í fyrsta umfari ikki døma í málinum, men spurdi partarnar, um teir ikki kundu samráða seg til eina semju. Teir skulu svara í dag, um teir góðtaka hetta uppskotið.

Annars greiddi sorinskrivarin frá sínari hugsan um málið. So partarnir vita, hvussu ein dómur fer at ljóða. Teir vita, hvør vinnur.

Selt tvær ferðir

Talan er av sonnum um eitt løgið mál:

Tann 10. september 1984 seldi Tórfinn Lambaa P/f Møblasøluni hjá Bergi Wardum ognina matr. 390 í Havn, t.e. Tórshøll. Frammanundan leigaði Bergur frá Tórfinni. Tað hevði hann gjørt síðani í februar 1983 og leigumálið skuldi vara til 1. apríl 1988.

Tórfinn Lambaa fekk sakførara sín, Sigurð Joensen at skriva keypssáttmála og skeyti. Prísurin var 2,2 mill. kr.

Góðar tvær vikur seinni, tann 27. september, verður matr. 390 aftur selt, hesa ferð til Birgir Andreasen, stjóran í Idémøblum. Prísurin: 2,0 mill. kr. Aftur skrivar Sigurð Joensen keypssáttmála og skeyti. Samstundis skrivar hann Bergi Wardum, at handilin við hann er tikin aftur, tí hann hevur misrøkt leigusáttmálan.


Hetta góðtekur Bergur Wardum ikki og letur Tinglýsingini skeyti sítt fríggjadagin 28. september kl. 16.00.

Mánadagin 1. oktober kl. 9.00 fær Tinglýsingin skeytið hjá Birgiri Andreasen. Í Dómhúsinum vóru tey greið yvir, at her var okkurt óvanligt á vási. Tí varð skrivað á skeytini, hvønn dag og hvat klokkan tey komu inn.

Forkeypsrætturin

Men hvat hendir? Bæði skeytini verða avvíst. Tí sambært bókum Tinglýsingarinnar er forkeypsrættur til matr. 390 í Havn. Hendan rættin eigur Johs. Sofus Olsen, hálvbróðir Tórfinns Lambaa. Hann hevur havt hann síðani 1949.

Nú byrjar so ein kapprenning til Johs. Sofus Olsen. Tann 4. oktober sigur hann frá sær forkeypsrættin til frama fyri Birgir Andreasen. Eina løtu eftir, Birgir hevur fingið forkeypsrættin, kemur Finnbjørn Mouritsen inn á gólvið. Hann vil keypa forkeypsrættin og bjóðar 100.000 kr. Men til fánýtis.



Løbe-nr. - 14 - Beløb

Fredag den 12.oktober 1984.

lyst 14265 Skøde,Torfinn Lambaa,Thv.t.P/f B.W.Møblasølan,matr.390 2.200.000.00
lyst 14266 Skeyti:Sanna Kragesteen,Thv.t.Andrias Joensen,Thv., Edmund Joensen,Oyrabakka,Sverra Joensen,Norðskála og Leiv Joensen,Oyri,matr.nr.67a,Oyri 340.000.00
lyst 14267 Skeyti,boet efter Hemming Jespersen,Tvøroyri,t.Føroya Landsstýri,matr.109b,Froðba. 11.540.00
lyst 14268 Leigusáttm.millum P/f Jákup á Dul og Postverk Føroya ..matr.nr.1326...Thv.
lyst 14379 skdbr.Jonny Jacobsen,Søldarfj.t.sm.3.pr.16 Lamba 65.000.00
lyst 14380 skdbr.Hanus Højgaard,Thv.t.sm. 4.pr.661 og 662, forhøjet t.
lyst 14381 skdbr.Arthur M.Hansen,Fuglafj.t.sm.2.pr.63b,forh.t. 175.000.00
lyst 14382 skdbr.Per Mortensen,Argir.t.sm.2.pr.181b,forh.t. 35.000.00
lyst 14383 skdbr.Agnar Nielsen,Vestm.t.sm.2.pr.231c,forh.t. 160.000.00
lyst 14384 skdbr.Arni Hansen,Thv.t.sm.7.pr.403a. 370.000.00
lyst 14385 skdbr.Georg Thorsteinsson,Thv.t.sm.1.pr.annul.anm. 70.000.00
lyst 14396c Skøde Thorfinn Lambaa,Thv.t.Birgir Andreasen,Thv.matr.390. 2.000.000.00

Følgende dokumenter er afviste fra tingbogen:
13541,13190,13214,14057,13436,13577,12693,13723,
12822,13844,12526,12538,11765,13463,13572,13422,
13025,13026,13755,13043,13909,13929,12749,12530,
13245,14114,13236.
------- o -------

Tinglýsingarlistin frá 12. oktober 1984: Føroya rættur sigur, at ovara keypið er tað rætta og forkeypsrætturin er burturdottin.